# VÍKINGUR

**Víkingur**
**Postsmoga 58**
**FO-520 Leirvík**
**www.vikingur.fo**

**STOVNAÐ**
**14. januar 2008**

**FORMAÐUR**
**Páll Gregersen**

**MEISTARAR**
**Ongantíð (GÍ hevur verið føroyameistari 6 ferðir)**

**STEYPAVINNARAR**
**Ongantíð (GÍ hevur verið steypavinnari 6 ferðir)**

**GREIPUVINNARAR**
**Ongantíð (GÍ hevur vunnið greipuna 2 ferðir)**

**Í 1. DEILD (1 ár)**
**2008-**

**Í EUROPA**
**Ongantíð (GÍ hevur spælt í Europa í 12 førum)**

## Spildurnýggir víkingar seta sær høg mál

**Fyrrverandi GÍ kempan Anton Skoradal er við stýrisvølin hjá víkingamanningini, sum er eyðkend av, at sigursvandu veteranarnir nú eru burtur og at spildurnýtt lið skal mennast**



*Tað er langt frá gullárunum í 90'unum til gerandisdagin í Sarpugerði. Men við samanleggingini av GÍ og LÍF roynir Víkingur at skapa fundamentið fyri einum liði, sum støðugt ger um seg í oddinum*

Í áttati árunum slerdi GÍ sítt navn rimmarfast millum tey bestu fótbóltsfeløgini. Í 1980 royndi GÍ seg fyrstu ferð í fremstu røð, og har hava gøtumenn verið síðani. Í 1982 royndi LÍF seg fyrstu ferð í bestu deildina, og tað tíggju ára skeiðið, tá ið grannaliðini ofta vóru í senn í bestu deildini, vóru nógvar intensar uppgerðir á skránni. LÍF var viðhvørt omaná, og í Gøtu minnast tey aftur á eitt nú 1987, tá ið teimum restaði eitt stig í at vinna FM, og dysturin í Leirvík endaði 2-2!

Nú eru LÍF og GÍ søga. Grøni, blái og guli liturin eru burtur, og Víkingur skal í Sarpugerði royna seg í ljósa bláum troyggjum og svørtum buksum.

Eingin av spælarunum frá stórtíðini hjá GÍ er eftir á liðnum. Magni Jarnskor, Poul Ennigarð og Sámal Joensen vóru teir síðstu, sum góvust. Harafturat eru fleiri teirra burtur, sum vóru við til at manna liðið í fjør. Útlendingarnir Tomasz Sejdak og Christian Lundberg hava ikki fingið boð um at koma aftur, Pól Jóhannes Justinussen, sum í fjør var málsøkin í vinstru síðu, er farin aftur til barndómsfelagið í Runavík, og einki er heldur at síggja til Hendrik Rubeksen, Pól Andreas Jacobsen og Jónreid Dalheim.

Veteranarnir eru stinni málverjin Geza Turi, liðformaðurin Niclas Niclasen, Hans Jørgen Djurhuus og Áslakur R. Petersen, so er tað Atli Gregersen, og hinir eru teir flestu 22 ár og yngri enn so.

Sverri, Sam, Símun Louis, Soltan og Sølvi teljast millum teirra, sum skulu lyfta Víking. Hanus Jacobsen er komin aftur av Argjum, Kaj Ennigarð er komin aftur úr KÍ, og Adrian Joensen, Hjartvardur Hansen og Andreas Lava Olsen eru saman við Sølva Vatnhamar leirvíkingarnir, sum stríðast um pláss á besta liðnum.

Tá ið GÍ vann FM oman á FM, vóru tað eftirnøvn sum eitt nú Jarnskor og Justinussen, ið myndaðu liðið. At eitt nýtt ættarlið er á veg bera álopsspælarin Finnur Justinussen – sonur Símun Petur – og Martin Olsen – systirsonur Jarnskorarnar og beiggi Súna Olsen – boð um.

Eisini venjarin er nýggjur, hóast talan er um gamlan GÍ kenning. Upprunaliga var ætlanin, at fyrrverandi miðvallarstríðsmaðurin Anton Skoradal skuldi vera hjálparvenjari hjá Dido, men brasiliumaðurin hevði ikki pappírini, og spælararnir eru stak væl nøgdir við Anton Skoradal, sum teir halda orduliga hevur fingurin á pulsinum.

Steypamøguleikin er burtur eftir tap í Vágum. Men saman ætla spælararnir og venjarin at lyfta Víking til betri endastøðu enn í fjør. Tá endaði GÍ á 5. plássi!

Tað er høgt mál, men áralagið er gott millum leirvíkingar og gøtumenn, sum hava staðið seg væl í venjingardystum – sigrar á ÍF og Skála og javnleikir ímóti B36 og HB.

| **MÁLVERJAR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Geza Turi (UNG) | |
| Mortan Joensen | |
| **VERJA** | |
| Áslakur R. Petersen | ÍF |
| Atli Gregersen | Frem |
| Niclas Niclasen | KÍ |
| Hanus Jacobsen | AB |
| Kaj Ennigarð | |
| Hjartvard Hansen | |
| Jan Poulsen | |
| **MIÐVØLLUR** | |
| Sam Jacobsen | |
| Sølvi Vatnhamar | |
| Símun Louis Jacobsen | |

| **MIÐVØLLUR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Magnus Skoralíð | |
| Hans Jørgin Djurhuus | |
| Martin Olsen | |
| Hans Pauli Petersen | |
| Andreas Lava Olsen | |
| Bárður Hansen | |
| **Álop** | |
| Sverri Jacobsen | |
| Finnur Justinussen | |
| Adrian Joensen | |
| Zoltán Bukzegi | |
| **TILGONGD** | |
| Hanus Jacobsen | AB |
| Zoltan Bukzegi | |

| **FRÁGONGD** | |
|---|---|
| Sámal Joensen | givin |
| Pól Ennigarð | givin |
| Jónreid Dalheim | givin |
| Thomas Zadejk | farin av landinum |
| Christian Lundberg | givin |
| Pól Jóhannus Justinussen | NSÍ |
| Magni Jarnskor | givin |
| Henrik Rubeksen | |
| **VENJARI** | |
| Anton Skoradal | |
| **LIÐLEIÐARI** | |
| Álvur Joensen | |